hvonn ★★★★★ LIVE

RÁS ...títt radio



# Góðir vanar gera teg til vinnara

Rasmus Ankersen hevur skrivað bøkur um vinnarar, talent og toppleiðarar. Hann hevur avgjørdar meiningar um, hvat skal til fyri at náa toppin innan arbeiði, ítrótt ella annað. Vit tosa við hann um, hvat eyðkennir sterkar leiðarar, og hvørjar góðar vanar kunnu geva tær succes í lívinum.

LEYGARKVØLDIÐ
29. mai kl. 19.00


Mona Breckmann

## Sterkari Mona leitar heim

18 ára gamla Mona Breckmann hevur roynt lívið sum fótbóltsspælari í Týsklandi, men kemur nú heimaftur til Føroya at búgva. Hon var bæði bangin og nervøs, tá hon fór avstað, men hon fótaði sær einsamøll í einum fremmandum landi. Vit tosa við Monu um, hvat hon hevur lært av tíðini í Týsklandi, og hvussu tað var at fáa eina eitt sindur kaldliga móttøku frá liðfeløgunum í Karlsruhe.


Grandma's Basement

## Kjallarabólkur og nýggj trio

Hesaferð fáa vit livandi tónleik frá tveimum tónleikabólkum. Annar er klaksvíksbólkurin Grandma's Basement, sum í næsta mánaði gevur nýggja fløgu út. Tónleikarar í bólkinum spæla onkrar av nýggju sangunum live. Eisini vitja Uni Debes, Petur Háberg og Filip Mortensen, sum júst eru farnir at spæla saman. Teir bjóða okkum eisini góðan live-tónleik.


Haddaway

## Akademiska poppstjørnan

Hann hevur selt 30 milliónir fløgur kring heimin, hevur verið á tónatindunum bæði í Europa og USA, og hevur einar 120 framførslur um árið. Haddaway er kendur við 90'ara hittinum What Is Love, men hann er meira enn bert ein poppstjørna. Hann er væl lisin, dugir fleiri mál flótandi og hevur meiningar um nógv. Haddaway vitjar Hvonn Live leygarkvøldið.


Hera Bjørk

## Hvør vinnur Grand Prixið

Tveir føroyskir tónleikarar hava roynt at sloppið til altjóða Tónleika Grand Prixið í ár. Vit spyrja Jógvan Hansen, hvat hann heldur um møguleikarnar hjá Íslandi, og Jens Marni Hansen sigur sína hugsan um danska sangin. Finalan í Eurovision kappingini verður leygarkvøldið.

Royal hárfríðkan · Coca-Cola · ATLANTIC AIRWAYS · Carlsberg · Kallkyn · Events